# Gjørt ávegis álit

**Nevndin, sum kannar sernámsfrøðina í landinum, hevur gjørt fyribils álit, sum tey nú ynskja viðmerkingar til**




*Nevndin, sum kannar sernámsfrøðina í Føroyum, hevur gjørt sínar metingar av skipanini, og fyribils álitið er nú alment á nýggjari heimasíðu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

KANNING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Seinnapartin hevði nevndin, sum kannar sernámsfrøðisliga økið í landinum, tíðindafund í Klaksvík.

Bólkurin, sum í november mánaði var settur at endavenda sernámsfrøðini, er nú komin við einum ávegis áliti, sum er lagt út til almenningin.

Álitið finst á nýggjari heimasíðu hjá nevndini, sum er at finna á adressuni www.umms.fo/ser. Heimasíðuna hevur Miðil í Klaksvík smíðað.

Tvey av teimum trimum fólkunum, sum hava sitið í nevdini, vóru á tíðindafundinum mikudagin, og tey hildu arbeiðið er komið væl ávegis.

– Vit leggja hetta fyribils álitið út til almenningin, tí vit ynskja viðmerkingar, áðrenn vit skrivað endaliga álitið. Fólk, sum hava áhuga fyri økjunum, skulu hava møguleikan at koma til orðanna, segði Tóra Tóroddsdóttir.

### Arbeiðsbólkurin

Umframt Tóru sita Hans Trygvi Teirin og Steintór Rasmussen í arbeiðsbólkinum.

Tóra Tóroddsdóttir er útbúgvin fysioterapeutur og hevur arbeitt í føroyska almanna-, skúla- og heilsuverkinum seinastu 20 árini.

Hans Trygvi Teirin er løgfrøgðingur og pápi at fjølbrekaðum barni. Hann hevur eisini verið formaður í Føroya Lærarafelag.

Steintór Rasmussen er útbúgvin fólkaskúlalærari. Hann hevur starvast í Næstved og í Klaksvík, og hann hevur verið sernámsfrøðisligur ráðgevi í skúlanum á Ziskatrøð.

### Riggar ikki

Vaksandi ónøgd við sernámsfrøðisliga økið var orsøkin til, at Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, í november mánaði í fjør setti ein arbeiðsbólk at kanna sernámsfrøðisliga økið.

Arbeiðsbólkurin fekk til 1. oktober í ár at gera eitt tilmæli til landsstýrismannin. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt kanningar á økinum og hevur staðfest, at økið riggar ikki nóg væl.

Í fyribils álitinum er harður kritikkur av verandi skipanini, og bólkurin kemur við einum uppskoti um nýggja skipan.

– Høvuðssetninurin hjá okkum er at fáa eina skipan í landinum, sum børn og foreldur finna runt í og fáa brúkt til fulnar, sigur Steintór Rasmussen.

### Kunnu kjakast

Arbeiðsbólkurin hevur verið skjótur í vendingini, tí størsti parturin av arbeiðnum er longur gjørdur.

Nú eru tað upp til fólk, sum hava áhuga í sernámsfrøðisliga økinum, at koma við viðmerkingum til fyribils álitið.

Á heimasíðuni hjá arbeiðsbólkinum ber til at senda bólkinum uppskot, viðmerkingar og annað í trúnaði, og tað ber eisini til at luttaka í einum almennum kjaki á síðuni.

Heimasíðan riggar fram til 1. juni, tá arbeiðsbólkurin fer undir at leggja seinastu hond á arbeiðið. Ætlanin er at lata landsstýrismanninum álitið fyri summarferiuna.






# Stýring og avtalur



**Mánadagin skipar TK-Stovan fyri einari kunning um betri stýring av tilboðsgeving, ordramóttøku og framleiðslugongdini, so endamálið at levera til avtalaðu tíð heldur**

Fundurin er fyri handverkaravirkir, tænastuvirkir og onnur virkir við framleiðslum ella tænastuveitingum, har tørvur er á betri stýring av tilboðsgeving, ordramóttøku og framleiðslugongdini yvirhøvur, so endamálið at levera til avtalaðu tíð heldur, skrivar Vinnuhúsið.

Fyrilestrahaldarin Ole Simmelholt starvast hjá Dansk Smedemesterforening, DS, sum ráðgevi hjá Dansk Smedemesterforening og er avhildin bæði sum fyrilestrahaldari og sum ráðgevi innan sítt øki.

Vegna DS gjørdi hann saman við øðrum fyri nøkrum árum síðani tilfarið »Udviklingsværktøj for mindre fremstillings- og håndværksvirksom-heder«, sum varð fíggjað av verkætlanini Viden & Kvalitet.

Ole Simmeholt tekur útgangsstøði í hesum tilfari, sum er væl roynt í hansara vinnugrein og sum ger, at tað er einfalt hjá arbeiðsgevaranum ella meistaranum at halda skil á, »við blýanti og pappíri« um neyðugt. Í samband við framleiðslustýring gjøgnumgongur hann eisini eina bólkauppgávu (variablar og fastar útreiðslur v.m.).

### Tænastuveitingar

Hann fer at greiða frá, hvussu tænastuveitingar/uppgávur kunnu stýrast, og hvussu hetta kann gerast við ymiskum einfaldum amboðum. Eisini greiðir hann frá, hvussu tú gert og brúkar eina starvsfólkahandbók, hvussu tú kann menna starvsfólk og best heldur fólk í starvi á minnum virkjum. Komið verður eisini inn á, hvussu tú setir nýggj fólk í starv.

Kunningarfundurin er skipaður við einum longri og einum styttri kaffisteðgi millum fyrilestrarnar, so høvi verður hjá luttakarunum at skifta orð. Møguleiki er at seta spurningar til fyrilestrahaldaran bæði undir fyrilestrunum og aftaná, skrivar Vinnuhúsið.



# Sigbrand nýggjur leiðari

**Sigbrand Johansen er settur sum økisleiðari fyri postøkið í Norðoyggjum**

STARV
*Eyðun Klakstein*

Klaksvík: 1. juni tekur Sigbrand Johansen við leiðarastarvinum fyri postøkið í Norðoyggjum.

Hann tekur við eftir Jóin Sigurðsson, sum gevst eftir 15 ár í starvinum.

Formliga tekur Sigbrand við 1. juni, men hann virkar í løtuni sum avloysari fyri leiðaran, sum eigur feriu og avspáking til góðar.

–Eg havi ikki roynt meg sum leiðara áður, so tí er tað nakað nýtt. Hetta verður ein spennandi uppgáva, sigur Sigbrand.

### 30 ár á baki

Sigbrand er gamal í garði á Posthúsinum í Klaksvík. Hann var fyrstu ferð avloysari har á summri í 1970, og 1. juni 1977 varð hann settur í fast starv.

Síðani hevur hann bara verið burturi frá eitt ár, tá hann var til skips.

Hann hevur verið postboð, men seinastu árini hevur hann avloyst nógv á skrivstovuni á Posthúsinum.



*Sigbrand Johansen hevur starvast á Posthúsinum í Klaksvík síðani 1970. Nú verður hann leiðari fyri postøkið í Norðoyggjum.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

# Blái Krossur nýggja rúslinju

RÚSEVNI
*Birita Andreasen*

Í Blákrossblaðnum herfyri, stóð at lesa um nýggja rúslinju hjá Bláa Krossi. Hetta er ein telefonlinja, sum hevur til endamáls, at hjálpa øllum teimun, ið á ein ella annan hátt hava trupulleikar við rúsevnum ella rúsdrekka.

Tann 4. apríl byrja telefonirnar hjá ymiskum ráðgevum kring landið at ringja. Í byrjanini verða umleið 30 køn fólk, ið sita við hornið og hjálpa øllum teimum ið hava tørv á tí. Hesi fólk hava øll hóskandi útbúgving og fleiri teirra eisini royndir. Telefonlinjan hevur verið roynd í eina tíð, og Blái Krossur metur, at tørvur hevur verið á hesi tænastu.

Øll kunnu ringja inn til rúslinjuna. Ikki bert menniskju við misnýtslutrupulleikum, men eisini til dømis avvarandi, arbeiðsgevarar og vinfólk. Alt fer fram í trúnaði.

Telefonnummarið hjá Rúslinjuni er 31 85 86.



# Arbeiðssteðgurin avlýstur

TÍÐINDASKRIV

Løgmaður hevur í skrivið dagfest 19/03 og á fundi við felag okkara 21/03 váttað at fyrrverandi landsstýriskvinnan í Almanna og heilsumálum, í samband við viðgerðina av dagstovnalógini, komið við skeivum upplýsingum.

Felagið hevur bygt síni sjónarmið á hesi úttalilsir frá fyrrverandi landsstýriskvinnu. Tá vit nú hava fingið staðfest frá løgmanni, at landsstýriskvinnan hevur mistikið seg, tekur felagið til eftirtektar, at tað eru kommunurnar sum hava samráðingarrættin fyri dagstovnaøkið.



Sum vanligt er tá lógir skulu tulkast, so hava vit lagt avgerðandi dent á tað Helena Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinna og upskotstillari segði frá tingsins røðarapalli. Vit halda tað vera spell, at løgmaður síðan skuldi staðfesta, at hesi úttalilsi frá landsstýriskvinnuna ikki vóru eftirfarandi.

Vit meta tað framvegis vera átaluvert at landsins myndugleikar seta í gildi lóggávu, uttan at teir sjálvir hava greiðu á einum so týðandi spurningi, sum hvør hevur samráðingarrættin á dagstovnaøkinum.

Felag okkara hevur ikki noktað at samráðast við kommununum, men fyri okkum hevur tað havt avgerðandi týdning at fáa staðfest hvør í veruleikanum hevði samráðingarrættin, tá so mótsigandi úttalilsir komu úr Landsstýrinum.

Vit liggja í sáttmálaloysi og støðan var tí ótolandi fyri felagið og limir okkara og hetta var orsøkin til at vit ikki sóu annan møguleika enn at lýsa arbeiðssteðg.

Nú løgmaður hevur ásannað, at fyrrverandi landsstýriskvinna hevur mistikið seg og komið við skeivum upplýsingum, hava vit avgjørt at avlýsa arbeiðssteðgin frá á midnátt hósdagin 22/3 og at taka upp samráðing við Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunusamskipan Føroya.


